# Pensjónsnýskipan og ávirkan pensjónsuppspararan sum heild

*Nógvar broytingar hava verið innan pensjónsøkið seinnu árini. Pensjónsnýskipan hevur verið á skrá í drúgva tíð og so seint sum í apríl í ár, kom ein røð av lógaruppskotum, ið førdu broytingar á pensjónsøkinum við sær. Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørjar avleiðingar pensjónsnýskipanin fær fyri keypiorkuna hjá komandi pensjónistum.*

## Nógvar broytingar

Farið verið ikki í smálutir við øllum broytingum á pensjónsøkinum í hesum skrivinum. Kortini kann nevnast, at pensjónsaldurin, eftir ætlan, hækkar líðandi í 68 ár í 2030, at pensjónsgjald verður lagt omaná eina røð av almennum veitingum og at forskattingin nú verður stigvaksandi úr 30% í 40%.

## Hvør verður pensjónistur eftir nýggju skipanini?

Skjótt fara vit at hava pensjónistar, sum eru undir tveimum ymiskum skipanum. Tey, sum gerast pensjónistar í 2020 ella seinni, fáa pensjón sambært **2020-skipanini**. Er ein longu pensjónistur ella gerst ein pensjónistur áðrenn 2020, verður pensjón útgoldin sambært **verandi skipan**. Niðanfyri verða sammetingar gjørdar, sum vísa munin á keypiorkunini hjá pensjónistum í báðum skipanunum.

## Egininntøka avgerandi fyri útgjaldið av fólkapensjón

Nógvir pensjónistar hava egna inntøku á pensjónsárum, nevnd **ársinntøka** ella **egininntøka** í pensjónshøpi. Hendan egininntøkan stendur av útgjaldi frá egnari uppspardari pensjón, vanliga sambært starvssáttmála, møguligari lønarinntøku, um pensjónisturin arbeiðir hóast pensjónsaldur er náddur og t.d. rentuinntøku av peningi standandi á bók og rentu ella vinningsbýti av virðisbrøvum. Samlaða egininntøkan er avgerandi fyri, um fólkapensjónistur fær fulla útgjaldið frá fólkapensjónini ella um mótroknað verður í fólkapensjónini, soleiðis at hendan verður lækkað.

## Mótrokning og útgjaldsupphæddir broyttar

Veitingarnar, ið fólkapensjónin stendur av, hava verið grundupphædd, viðbót, brennistuðul og AMEG (eisini rópt samhaldsfasti). Í verandi skipan verður mótroknað í viðbótini og brennistuðul verður bert latin, um egininntøkan er lægri enn kr. 60.000 árliga hjá støkum pensjónisti og kr. 80.000 hjá pensjónistahjúnum.

Í verandi skipan verður lutfalsliga ógvusliga mótroknað í viðbótini. Um árliga egininntøkan er hægri enn kr. 61.900, verður mótroknað við 60%. Hetta merkir, at um pensjónistur t.d. hevur egininntøku á kr. 121.900, ið er kr. 60.000 omanfyri mótrokningarmarkið, lækkar viðbótin við 60% av kr. 60.000 ella við kr. 36.000 árliga. Útgjaldið frá viðbótini, í verandi skipan, er árliga kr. 45.252 til staka pensjónistin og kr. 36.372 til gifta pensjónistin. Við hesi mótrokning hevði árliga viðbótin hjá staka pensjónistinum lækka niður í kr. 9.252 og niður í kr. 372 hjá tí gifta. Av tí at ársinntøkan er omanfyri kr. 60.000, fær pensjónisturin við hesi egininntøkuni ongan brennistuðul.

| Útgjald mánaðarliga | Verandi skipan | | | | Nýskipan frá 2020 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Støk | | Gift | | Støk | | Gift | |
| Veiting | Útgjald | Mótrokning | Útgjald | Mótrokning | Útgjald | Mótrokning | Útgjald | Mótrokning |
| Grundupphædd | 3.589 | Eingin | 2.733 | Eingin | 3.589 | 25% í egininntøku > 60.000 | 2.733 | 25% í egininntøku > 60.000 |
| Viðbót | 3.771 | 60% í egininntøku > 61.900 | 3.031 | 60% í egininntøku > 61.900 | 4.779 | 40% í egininntøku > 232.200 | 3.537 | 40% í egininntøku > 191.200 |
| Brennistuðul | 634 | Um egininntøka < 60.000 | 634 | Um hjúnar egininntøka < 80.000 | 0 | | 0 | |
| AMEG (2018) | 4.545 | Eingin | 4.545 | Eingin | 5.635 | Eingin | 5.635 | Eingin |
| AMEG (2019) | 5.590 | Eingin | 5.590 | Eingin | | | | |

*Talva 1 Fólkapenjónsveitingar og mótrokningarmørk í verandi skipan og nýggju "2020-skipanini"*

Høvuðsmunurin millum verandi skipan og nýggju "2020-skipanina" er, at í 2020-skipanini verður mótroknað fyrst í grundupphæddini (henda verður ikki mótroknað í verandi skipan), men kortini verður lagaligari mótroknað. Mótroknað verður við 25%, um egininntøkan fer upp um kr. 60.000.

Umframt hetta sæst í talvu 1, at útgjaldið frá viðbótini er hækkað. Viðbótin er í dag kr. 3.771 mánaðarliga fyri staka pensjónistin og kr. 3.031 til gifta pensjónistin. Harafturat kemur brennistuðul á kr. 634 mánaðarliga, um egininntøkan er niðanfyri markið. Í 2020-skipanini er viðbótin hækkað í kr. 4.779 mánaðarliga til staka pensjónistin og í kr. 3.537 til gifta pensjónistin.

Onnur týðandi broyting er, at mánaðarliga útgjaldið frá AMEG, ið var kr. 4.025 í 2017, er hækkað í kr. 4.545 í 2018 og hækkar aftur í kr. 5.590 í 2019. Í 2020 verður mett, at útgjaldið frá AMEG verður kr. 5.635. Orsøkin til hækkingina er, at inngjaldið til AMEG eisini hækkar. Í dag rinda løntakari og arbeiðsgevari 2,25% av løn inn í AMEG. Hetta varð í ár (2018) hækkað í 2,50% og verður í 2019 3,00% fyri hvønn partin, soleiðis at samlaða gjaldið av løn, verður 6,00%. Við øðrum orðum fíggja partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir hækkingina í útgjaldinum frá AMEG.

## Útgjald av fólkapensjón tengd at egininntøku

Sum áður nevnt, er tað egininntøkan hjá pensjónistinum, sum er avgerandi fyri, um hesin fær fulla fólkapensjón ella um nakað verður hølvað av teimum veitingunum, sum mótroknast kann í, sambært talvu 1




*Mynd 1 Samanhangur millum árliga egininntøku og útgjald í fólkapensjón. Verandi skipan fyri stakan pensjónist*

Vit hyggja fyrst eftir, hvussu egininntøkan ávirkar mánaðarligu fólkapensjónina í 2019 hjá stakum pensjónisti, sum er pensjónistur undir **verandi skipan**.

Sum mynd 1 vísir, er verandi pensjónsskipan sett soleiðis saman, at um árliga egininntøkan er minni enn mótrokningarmørkini, víst í talvu 1, er eingin skerjing í fólkapensjónini. Allar fýra veitingar eru tá óskerdar. Sum egininntøkan hækkar, verður fyrst brennistuðulin strikaður og mótroknað verður í viðbótini. Til dømis er viðbótin

lækkað úr kr. 3.771 mánaðarliga í kr. 866 mánaðarliga, um egininntøka er kr. 120.000 árliga. Grundupphæddin og útgjaldið frá AMEG ávirkast ikki av egininntøkuni

Hesar upphæddir eru kortini ikki tær upphæddir, sum pensjónisturin hevur at liva fyri, tí skattur skal rindast av viðbótini og AMEG-útgjaldinum.

Hyggja vit nú eftir, hvussu fólkapensjónin er samansett og hvussu mótroknað verður í **2020-skipanini**, tengt at egininntøkuni, er myndin nakað ørvísi.




*Mynd 2 Samanhangur millum árliga egininntøku og útgjald í fólkapensjón. 2020-skipan fyri stakan pensjónist*

Sum vit sóu í talvu 1, eru upphæddirnar (undantikið grund-upphæddin) og mótrokningar-hátturin broyttur. Mótvegis verandi skipan, verður í 2020-skipanini fyrst mótroknað í grundupphæddini og tá hendan er fult mótroknað, verður farið undir at mótrokna í viðbótini. Fyri stakan pensjónist, er fult mótroknað í grundupphæddini, tá árliga egininntøkan fer upp um kr. 232.200 og fyri giftan pensjónist, tá egininntøkan fer upp um kr. 191.200. Fer egininntøkan upp um hesi mørk, verður byrjað at mótrokna í viðbótini við 40%. Her skal aftur minnast til, at í mynd 2, er skattur ikki roknaður av viðbótini og AMEG-útgjaldinum. Áðrenn pensjónisturin kann nýta peningin, skal hesin skattast umvegis afturhaldsskipanina. Tí er viðkomandi at hyggja eftir **keypiorkuni** hjá pensjónisitinum, tað vil siga hvørja upphædd pensjónisturin samlað hevur eftir aftaná skatt, tá fólkapensjón og egininntøka verða tikin við í roknistykkið.

## Keypiorka hjá pensjónistum

Ein lýsing av keypiorkuni hjá pensjónistum og av hvussu hendan er ávirkað av, hvørt pensjónistur er undir verandi skipan ella kemur undir 2020-skipanina, kann best lýsast við trimum dømum, ið fyrst hyggur eftir støkum pensjónistum.

Vit hyggja fyrst eftir pensjónisti við **ongari egininntøku**. Hetta er pensjónistur, sum, av einhvørjari orsøk, ikki hevur spart upp til egna pensjón og sum heldur ikki hevur arbeiðsinntøku sum pensjónistur. Undir verandi skipan fær hesin kr. 11.278 mánaðarliga, eftir skatt, at liva fyri tá upphæddirnar fyri 2019 verða útgoldnar. Gerst hesin pensjónistur undir 2020-skipanini økist hendan upphæddin í kr. 11.313 mánaðarliga, eftir skatt. Hetta er ein samlað øking í keypiorkuni á kr. 35 mánaðarliga.




*Mynd 3 Fyri staka pensjónistin er avgerandi, um egininntøkan liggur niðanfyri ella omanfyri kr. 210.000 árliga*

Er talan um **egininntøku á kr. 120.000 árliga**, ella kr. 10.000 mánaðarliga, fær hesin kr. 16.974 mánaðarliga, eftir skatt at liva fyri í 2019, undir verandi skipan. Hendan upphædd stendur av fólkapensjón umframt egininntøkuni, ið t.d. kann vera egin uppspard pensjón ella lønarinntøka. Undir somu fortreytum, hevði upphæddin verið kr. 18.238 mánaðarliga, eftir skatt, um pensjónsárini byrjaðu í 2020 ella seinni. Hetta er ein øking í keypiorku á kr. 1.264 mánaðarliga.

Um onkur fær meira má onkur fáa minni. Pensjónsnýskipanin er sett soleiðis saman, at keypiorkan hjá pensjónistum við hægru egininntøkunum lækkar, fyri at keypiorkan hjá teimum við lægri egininntøkunum kann hækka.

Hyggja vit eftir einum pensjónisti við **egininntøku á kr. 360.000 árliga**, ið er kr. 30.000 um mánaðin, fær hesin kr. 32.725 at liva fyri mánaðarliga í 2019, um hesin gjørdist pensjónistur undir verandi skipan. Gerst hesin ístaðin pensjónistur undir 2020-skipanini, lækkar keypiorkan við kr. 3.259 í kr. 29.466 mánaðarliga.

Myrkabláu stabbarnir í mynd 3, eru tey trý dømini, ið júst eru nevnd. Myndir vísir, at teir pensjónistar, ið vinna mest í keypiorku av pensjónsnýskipanini, eru teir, ið hava egininntøku, ið liggur millum kr. 70.000 og kr. 200.000. Myndin vísir eisini, at pensjónistar við egininntøkum omanfyri kr. 200.000 árliga, eru "tapararnir" av pensjónsnýskipaini. Er egininntøkan undir kr. 60.000 árliga, er at kalla ongin munur.

## Giftir pensjónistar ávirkast øðrvísi

Mótrokningarmørkini og upphæddirnar, ið koma til útgjalds hjá giftum pensjónistum, eru øðrvísi enn hjá teimum støku pensjónistunum. Tí sær myndin hjá teimum giftu pensjónistunum eisini øðrvísi út.

Hyggja vit eftir teimum somu trimum dømunum, sum fyri støku pensjónistarnar omanfyri, sæst, at gifti pensjónisturin við ongari egininntøku fær ein keypiorku, ið er kr. 284 lægri, um hesin gerst pensjónistur í 2020, sammett við verandi skipan og útgjaldsupphæddunum í 2019.




*Mynd 4 Fyri gifta pensjónistin er avgerandi, um egininntøkan liggur niðanfyri ella omanfyri kr. 170.000 árliga*

Hevði hesin gifti pensjónisturin havt eina egininntøku ár kr. 120.000 áriga, øktist mánaðarliga keypiorkan við kr. 945 mánaðarliga úr kr. 15.648 í kr. 16.593.

Giftur pensjónistur við árligari egininntøku á kr. 360.000 missir keypiorku. Tí um hesin er pensjónistur undir verandi skipan, fær hesin kr. 31.689 eftir skatt at liva fyri um mánaðin í 2019, men pensjónsnýskipanin lækkar keypiorkuna við kr. 2.707

Viðkomandi er, at meðan markið í egininntøkuni fyri, nær pensjónistur fær hægri ella lægri keypiorku liggur á kr. 200.000 hjá staka pensjónistinum, er markið niðri á kr. 170.000 hjá gifta pensjónistinum. Teir giftu pensjónistarnir gerast sostatt skjótari "taparar" av pensjónsnýskipanini, sum egininntøkan veksur. Júst hvar markið er, er tengt at kommunuskattaprosentinum og lutfallinum millum forskattaða og óskattaða pensjónsupparping ella lønarinntøku. Umframt hetta, eru giftu pensjónistarnir, við egininntøkum niðanfyri markið fyri útgjaldi av brennistuðli, "taparar" av nýskipanini.